# Eitt ár við Lissuni

*Ongum nýtist at fara í Lissuna til fánýtis, tí vøruúrvalið er stórt, og er til menn, kvinnur og børn*




**Tað er sera einfalt, hví eigarin av skóhandlinum Lissan fór í gongd við slíkan handil. Hon elskar nevniliga skógvar. Tað er umráðandi at fylgja væl við, verður mett í Lissuni**

Á Norðskála eru fleiri handlar komnir síðstu árini, og ein av teimum nýggjaru er Lissan.

Eigarin sigur, at einafalda orsøkin til, at hon fór í gongd við skósølu er, at hon elskar skógvar.

Hon arbeiddi annars á støð í eini 20 ár og dámdi væl, Men hugurin at royna nakað nýtt førdi til Lissuna.

Lissan er nú beint yvir ár ár.

Handilslívið í økinum er í fagrasta blóma, og fleiri handlar eru komnir á Norðskála.

Og nógv fólk leggur leiðina framvið, og hetta merkja handlarnir.

Og í Lissuni merkja tey eisini, at ymsu handlarnir hava gleði hvør av øðrum, tí fólk kunnu koma í økið og fáa ymsa vøru, og sleppa kanska undan at koyra longri teinar.

Í Lissuni verður dentur lagdur á at fylgja væl við.

Roynt verður at fara á messur og annars at fáa tað gamla út, og nýtt úrval inn.

- Tað er umráðandi at fylgja væl við, verður mett í Lissuni.

Og ongum nýtist at fara í Lissuna til fánýtis, tí vøruúrvalið er stórt, og er til menn, kvinnur og børn.

Og hugsað verður eisini um at hava skógvar til bæði yngri og eldri.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo'*

















